LM-099/2023

Fylgiskjal 26

Hoyringssvar til uppskotið til løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu (Ferðavinnulógin)[i]

Vegna eigararnar í Slættaneshaga vil hagastýrið við hesum staðiliga mótmæla at uppskotið um Løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu verður lagt fyri løgtingið.

Í fyrsta lagi mótmæla vit, at uppskotið verður lagt fyri Løgtingið í verandi líki – og í øðrum lagi, at tað verður samtykt sum tað fyriliggur.

Eigararnir í Slættaneshaga taka undir við yvirlýsingini hjá Bóndafelagnum og Óðalsfelagnum frá hoyringsfundinum um ætlaðu Ferðavinnulóggávuna – føroyingar frítt at fara".

Endamálsorðingin í lógaruppskotinum er soljóðandi:

- "Ferðavinna skal í øllum lutum skipast á burðardyggum grundarlagi til tess at tryggja fólkaræði, frælsi, trivnað, inntøkur og vinnumøguleikar hjá fólkinum kring landið við at:

1. verja náttúru, tilfeingi og siðvenju,
2. strykja staðbundin samfeløg, mentan og mentanararv,
3. styrkja samstarv millum ferðavinnu og aðrar vinnur, og við at
4. kunna um, hvussu farast skal fram í náttúruni, og hvussu ferðavinnan er skipað

Stk. 2. Reglur, fyriskipanir, avtalur o.a. framt eftir hesi løgtingslóg skulu miða eftir at røkka hesum málum"

Yvirhøvur er eftir okkara tykki trupult at fáa eyga á burðardygdina í uppskotinum – serliga hvat í uppskotinum ger nýggju skipanina meira burðardygga enn loysnina, sum vit hava í dag – við at spyrjast skal áðrenn man gongur á ogn hjá øðrum.

Fyri at lógaruppskotið kann fremjast er neyðugt at man strikar kapitull 5 í lov for Færøerne om Hegn og Markfred, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020. Kapitull 5 er um færdsel paa Anden mands grund[ii].

Verður lógaruppskotið samtykt, verður tað vónleyst at liva við. Millum annað:

1. at greiða frá hvat tær 150 kr eru fyri
2. at greiða frá tá man tekur eyka gjald
3. at greiða frá, hví man krevur at einans slepst í hagan við góðkendum ferðaleiðara
4. býtislykilin av pengum
5. hvar tað er í lagi at ganga
6. hvar tað ikki er í lagi at ganga
7. nær tað er í lagi at fara í hagan
8. at eigararnir fáa fráboðanarskyldu til landstýrismannin, tá teir skulu gera sítt arbeiði
9. landsstýrismaðurin fær alt ov víðar heimildir
10. skiftandi landsstýrismenn fara at hava skiftandi meiningar
11. Centraliseringin av stýringini gagnar ikki útjaðaranum

Nógvir veikleikar og ivamál í uppskotinum.

Rættindi vera tikin frá eigarum og festarum, við tað at reglurnar í verandi lóg um hegn og markafrið verða strikaðar.

Rættindini, sum eigarar og festarar hava í dag verða tikin frá okkum – og tað í kemur í staðin, livir als ikki upp til tey rættindini sum vit í nógvum førum hava keypt okkum til. Tískil meta vit, at skal uppskotið samtykkjast, má samsýningin fyri mist rættindi liva upp til tað sum vit missa. Tað vil siga, tær framtíðar inntøkurnar, sum ferðavinnurekandi fáa og sum vit eiga í dag, mugu rindast okkum.

Tað undrar okkum almikið at eitt uppskot um burðardygga ferðavinnu einans snýr seg um hvussu farast skal fram uttanfyri bøgarðarnar og ikki hvussu ferðavinna kann rekast innanfyri bøgarðarnar.

Javnan kemur tað fyri at leitast má eftir fólki á Slættanesi – tá frítt verður hjá øllum at ganga allastaðni má roknast við, at hetta fer at koma alsamt oftari fyri. Higartil hava vit følt tað sum eina skyldu at møta upp til leiting og bjarging. Men tá vit so at siga missa øll rættindi at hava okkara egnu ogn sum okkara, so er meiningsleyst at vit skulu hjálpa til við leiting av vilstum fólkum og fólkum, sum hava gingið seg føst. Yvirhøvur leggur lógaruppskotið alt ov lítið upp til at útlendingar, sum ætla sær til Føroya at ganga í høgunum skulu hava eina trygging, sum dekkar møguliga leiting og/ella bjarging.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur at orsøkin til lógaruppskotið er: " Í 2011 varð farið undir veruliga skipaða marknaðarføring av Føroyum sum ferðamannalandi. Endamálið var at økja ferðafólkatalið soleiðis, at ferðavinnan kundi gerast eitt týðandi ískoyti til samfelagsbúskapin. Henda marknaðarføring eydnaðist væl, og ferðafólkatalið er vaksið nógv seinastu árini. Vaksandi ferðafólkatalið hevur kortini eisini gjørt greitt, at tørvur er á at skipa ferðavinnuna á ein slíkan hátt, at hon í størst møguligan mun er fólki og landi til gagns. "

Eftir okkara tykki, hava tey sum hava marknaðarført Føroyar, ikki havt áhuga í at virða verandi lógarverk og galdandi reglur, um at biðja um loyvi fyri at brúka tilfeingi hjá jarðareigarum, men heldur hinvegin, lagt upp til at øll kunnu koma til Føroyar, ganga frítt og ókeypis.

Heldur enn at skipa viðurskiftini fyri at gera eina burðardygga ferðavinnu, síggja vit hetta uppskotið, sum eitt, sum tekur rættindini frá eigarum at skipa viðurskiftini og rættindini at taka tann kostnað fyri at brúka lendið hjá eigarum.

Verður uppskotið til veruleika verður ognarrætturin og brúksrætturin hjá teimum sum í dag vara av uttangarðsjørðini frátikin hesum.

Tað eru fleiri aðrir møguleikar at loysa avbjóðingarnar uppá – til dømis:

- Marknaðarføring, sum er í tráð við galdandi lóg
- Upplýsing til ferðafólk tá tey koma til landið um at reglurnar um hvussu man fyriheldur seg tá man gongur í haganum

Verður uppskotið lagt fyri Tingið í verandi líki, hava vit hesar viðmerkingarnar til lógina:

Grein 1 - Burðardygdin verður ikki staðfest í lógaruppskotinum, í og við, at øll kunnu ganga har tey vilja, um ikki ætlan er gjørd fyri túrar. Tað vit her skilja sum burðardygd, er tað sama sum náttúruverndarlógin, sum kom í gildi 1. januar 2024, leggur upp til.

Grein 2 - Hvat verður lagt í, at festari verður nevndur brúkari?

Grein 3 – Hendan greinin er eftir okkara tykki óbrúkilig og tekur øll rættindini til at brúka og fara við egnari ogn sum ogn, frá eigarum. Festarar sum, sum er, hava eigaralíknandi rættindi missa eisini hesi.

Grein 4 - Hvat er órímiligur ampi?

Grein 5 - Eigarar og festarar mugu hava heimild til at nokta vinnuligum virksemi á egnari ogn. Um ikki so mugu eigarar og festarar fáa samsýning fyri tey rættindini sum vit missa og sum vera givin ferðavinnurekandi.

Grein 6 - Ferðavinnuætlanin má hava møguleika til at steingja hagar t.d. í fjalltíð (várgongur og heystfjøll) brundtíð; harutíð og lembing. Á Slættanesi er ikki gjørligt í langa tíð frammanundan at áseta ávísan dag – tá vit skulu gera arbeiði í haganum, má veðrið ráða – tí vit skulu hava gott veður bæði á landi og sjógvi.

Landstýrismaðurin fær alt ov víðar heimildir, tí hann skal góðkenna ferðavinnuætlanina fyri hvønn einstaka haga – skiftandi landsstýrismenn við skiftandi meiningum og virðum – fara at seta og góðtaka ymiskar ferðavinnuætlanir – hetta tryggjar ikki støðufesti.

Grein 7 - Bygdin og heimafólki hevur sum so onki við uttangarðsgjørðina at gera – lógaruppskotið umfatar annars rættindini í uttangarðsjørini – í verandi reglum stendur at hagastýrisformennirnir skulu búgva í bygdini – ein nevnd samansett av hagastýrum í ávísu markatalsbygdunum hevði verið rættari enn – at nevnd, sett av kommununi, kann fáa heimild til at gera reglur fyri, hvussu ferðavinnan kann skipast og útinnast uttangarðs.

Grein 8 - Er skilagóð, um eigarar, festarar (hagastýri) ikki missa rættin til at nokta fólki at fara í hagan ella ganga eftir gøtunum.

Grein 9 – Vanligt vit og skil skal sjálvandi altíð brúkast - men nærri reglur fyri hvussu gongdin í haga og skilhaldsregur kunnu gott nágreinast í lógini – eisini hvør hevur skyldu til at rudda, um skilhaldsreglurnar ikki verða fylgdar.

Grein 10 - Er óneyðug um eigarar og festarar sjálvi sleppa at avgerða hvør, hvussu og nær farast kann í hagan.

Grein 11 - Hvør grein vigar meira, grein 5 ella grein 11 viðvíkjandi tá fólk hava frítt at fara (eigarar, festarar hava ikki heimild at nokta), men í grein 11 stendur at bara kunnu fara við staðkendum fólki. Hvat um ongin staðkendur er tøkur ella hevur hug at fara?

Grein 14 - Fólk kunnu ikki fáa rættindi til ogn hjá eigarum. Um so er, so má rindast eigarunum fyri tey mistu rættindini.

Landsstýrismaðurin fær alt ov víða heimild til at áseta náttúrugjaldið einsamallur – og skiftandi landsstýrismenn við skiftandi meiningum – fara at máa støðufestið undan skipanini.

Býtislykilin er alt ov innviklaður og ógjørligur at umsita, um ikki øll inntøkan skal fara upp í løn til tey sum umsita náttúrugjaldið. Alt ov lítil partur fer til jarðareigararnar og festararnar, sum frammanundan missa øll síni verandi rættindi – um rættindini vera flutt í so stóran mun, má størsti parturin, um ikki øll inntøkan frá náttúrugjaldinum fara til jarðareigararnar og festararnar.

Grein 15 – Hvørjum ábygdara kann landsýrismaðurin áleggja at fáa viðurskiftini í rættlag? Hegn og frágarðar má man kunna gerða við landbúnaði og djórahaldið fyri eygað á egnari ogn uttan at spyrja landsstýrismannin eftir.

Grein 17 – Sum nevnt nakrar ferðir omanfyri, so kunni verandi lógarásetingar, eftir okkara tykki, ikki strikast, uttan at eigarar fáa samsýning, sum svarar til tey mistu inntøkurættindini sum vit hava í dag.

Við ynski um at landsstýrismaðurin hugsar seg væl og virðiliga um áðrenn uppskotið verður lagt fyri Føroya Løgting.

Heilsan

Hagastýrið fyri Slættaneshaga

Jóanis Nielsen

Johan Nielsen

Zacharis Thomassen

Thorfinn Nielsen

Heri Christoffersen